# Gjógvin í samfelagnum verður størri



**RÓAR AKRALÍÐ**
skrivari í Búskaparráðnum

**Í hesum døgum er uppskot lagt fram um broyting í lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994. Broytingaruppskotið staðfestir, at núverandi reiðarar í føroysku fiskivinnuni hava ræðisrættin á fiskatilfeinginum, hóast lógin um vinnuligan fiskiskap sigur, at *livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks.* Tað vil siga, at virðið á órørda fiskinum í sjónum framvegis fer at falla til einstaklingar í fiskivinnuni. Hetta víðkar um gjónna í føroyska samfelagnum.**

**Virðið á tilfeinginum**
Virðið á tí órørda tilfeinginum, eisini kallað tilfeingisrentan, er tann peningaliga upphædd, sum tilfeingið kann seljast fyri, áðrenn mannahond hevur nortið við tað. Hetta er til dømis tað marknaðarvirði, ið silvurmálmið hevur í einum námi, áðrenn arbeiðsmenninir hava tikið tað úr náminum, tað marknaðarvirði, ið træið hevur í skógini, áðrenn skóghøggarin hevur sett øksina á tað, og tað marknaðarvirði, ið fiskurin hevur í sjónum, áðrenn fiskimaðurin hevur fingið fiskin í trolið. Hetta kann verða lýst við einum dømi. Vit hugsa okkum, at landsstýrið lýsir *10* fiskidagar til sølu í útvarpinum. Tann hægst bjóðandi fær fiskidagarnar, og boðini frá fólki, sum hava hug á vinnuni, verða send til landsstýrið. Tað vísir seg, at tann hægst bjóðandi vil geva *10.000* kr. fyri fiskidagarnar. Tá hevur keyparin fingið *1* fiskidag fyri *1.000* kr., og um skipið hjá viðkomandi fiskar í miðal *1.000* kg. um dagin, so er tilfeingisrentan *1* kr. fyri *1* kg. av fiski.

**Hvussu stórt er virðið?**
Eingin kann siga við vissu, hvussu stór tilfeingisrentan er í føroysku fiskivinnuni í løtuni. Vit hava jú ongan frían marknað, har søla av fiskidøgum kann fara fram[1]. Men tó ber til at gera nakrar metingar. Til dømis ber til at hyggja eftir teimum skipasølum, sum eru farnar fram seinnu árini. Tá ið skip verða seld, fylgja jú summar tíðir fiskiloyvini við í søluni, og prísurin á fiskiloyvinum er jú tann upphædd, sum keyparin væntar at fáa burturúr fiskitilfeinginum - sostatt virðið á tí órørda fiskinum í sjónum.

Viðmerkjast kann, at sølurnar ikki hava verið lýstar í útvarpinum, soleiðis at øll fingu møguleika at bjóða. Hesar sølur eru hóast hetta áhugaverdar at hyggja eftir, tá ið ein skal meta um tilfeingisrentuna, tí í øllum førum kann staðfestast, at var talan um fría sølu, hevði søluprísurin ikki verið undir galdandi søluprísi. Væntast kann jú, at keyparin eisini hevði bjóðað í einari fríari sølu. Niðanfyri er talva við mettum søluprísum á føroyska fiskiflotanum við fiskiloyvum, og haraftrat sæst søluprísurin á samlíkum skipum uttan fiskiloyvi. Tølini byggja á tær sølur, sum hava verið seinastu árini fram til á heysti 2006. Leggið til merkis, at sølurnar góvu ein væl hægri prís, tá ið skipini vórðu seld við fiskiloyvum. Til dømis var miðal søluvirðið á partrolarum 18 mió. kr., harav var fiskiloyvið vert 12 mió. kr. Tað vil siga, at tá ið ein selur eitt slíkt skip, fær ein 12 mió. kr. fyri fiskiloyvið.

Sí talvu



*- Uppskotið hjá Bjørn Kalsø átti at tryggjað, at tilfeingisrentan endaði hjá eigarunum av tilfeinginum, Føroya fólki. Tað átti at minkað um váðan í fiskivinnuni. Og tað átti at gjørt tað lætt hjá ungum føroyingum at komið inn í fiskivnnuna. Men uppskotið lýkur onga av hesum treytum, sigur Róar Akralíð, sum er skrivari í Búskaparráðnum*

*Savnsmynd*

**Víðkað gjógv í samfelagnum**
Uppskotið hjá fiskivinnumálaráðharranum broytir ikki støðuna í dag, har tilfeingisrentan fellur til núverandi reiðarar í fiskivinnuni. Uppskotið staðfestir jú, at loyvishavarin fær sítt loyvi endurnýggjað, um hann framhaldandi lýkur nakrar treytir í lógini. Roknast kann við, at tá ið so stórar upphæddir eru upp á spæl, fer eingin loyvishavari í gáloysni at spæla sær av við loyvið.

Gjógvin í samfelagnum fer at víðkast, tá ið eitt so virðismikið tilfeingi verður misjavnt býtt millum føroysku borgararnar. Haraftrat er hetta, at nakrir fáir føroyingar kunna selja tað livandi tilfeingið og koyra peningin í lumman, ikki í tráð við lógina um vinnuligan fiskiskap, tí har verður ásett, at Føroya fólk eigur tað livandi tilfeingið. Nei, um lógin varð fylgd, skuldi landið fingið tilfeingisvirðið, tí einans tá kemur tað øllum Føroya fólki til góðar. Landsstýrið kundi tá til dømis brúkt peningin til at útbygt landið ella givið Føroya fólki ein varandi skattalætta, tá ið rúm varð fyri tí í búskapinum.

**Aðrar avleiðingar**
Uppskotið minkar ikki um váðan í fiskivinnuni, tí tað noyðir framvegis keyparar at rokna virðið á einum fiskiloyvi langt fram í tíðina. Ein keypari kann jú ikki vita, hvussu fiskivinnan sær út um tjúgu ár. Hvussu verður til dømis við oljuprísinum? Tað gerst heldur ikki lættari hjá ungum føroyingum at koma inn í fiskivinnuna. Hesir noyðast jú at fáa stórar upphæddir til vega, um teir ætla at taka lut í vinnuni. Haraftrat ger tað bara skaðan enn verri, at uppskotið ikki avtekur veðhaldsforboðið. Tá ið fiskiloyvir kunnu seljast, mugu tey eisini kunna setast í veð. Veðhaldsforboðið, sum bæði vantar grundan og grundgevingar, økir bara tann fíggjarliga váðan.

Politikkarar áttu eisini at hugsað um tey næstu ættarliðini av reiðarum.

**Niðurstøða**
Uppskotið hjá fiskivinnumálaráðharranum átti at lokið tríggjar treytir. Tað átti at tryggjað, at tilfeingisrentan endaði hjá eigarunum av tilfeinginum, sum er Føroya fólk. Tað átti at minkað um váðan í fiskivinnuni, og tað átti at gjørt tað lætt hjá ungum føroyingum at komið inn í fiskivinnuna. Uppskotið hjá fiskivinnumálaráðharranum lýkur einki teirra.

***Søluvirðið, mió. Kr.***

| *Bólkur* | *Skipatal* | *Søluvirðið pr. skip* | *Virðið pr. fiskiloyvi* | *Søluvirðið í alt* | *Loyvisvirðið Í alt* |
|---|---|---|---|---|---|
| Lemmatrolarar | 12 | 14 | 4 | 168 | 48 |
| Partrolarar | 28 | 18 | 12 | 504 | 336 |
| Línuskip | 25 | 12 | 10 | 300 | 250 |
| Garnaskip | 7 | 12 | 10 | 84 | 70 |
| Trol. á landleið. | 16 | 18 | 10 | 288 | 160 |
| Flakatrolarar | 4 | 150 | 75 | 600 | 300 |
| Nóta- og trolskip | 7 | 300 | 150 | 2.100 | 1.050 |
| Mett søluvirði í alt | | | | 4.044 | 2.214 |

*Talvan vísir, at tilfeingisrentan í føroysku fiskavinnuni verður mett at vera yvir tvær milliardir krónur*

*[1] Ein slíkur marknaður kann sjálvandi skipast. Búskaparráðið hevur lýst ein slíkan marknað í várfrágreiðingini frá 2000. Hon kann takast niður á www.ecouncil.fo.*